HYGG HER

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Jumpy 1,9TD
8 fer andi
km. 28.200, árg. mars 2000
190.000,-

Citroen Xantia
1,9 TD 5H
km. 94.000, árg. okt. 1996
115.000,-

Citroen Xantia II
2,0 HDi stc. 5H
km. 100.000, árg. sept.1999
139.000,-

Citroen Xsara
2,0 HDi stc. 5H
km. 83.000, árg. juni 1999
140.000,-

Citroen ZX 1,4i
5H
km. 70.000, árg. feb. 1996
75.000,-

Citroen ZX 1,9D
5H
km. 98.000, árg. jul. 1997
72.000,-

Mitsubishi L300
2,5D
km. 161.000, árg. juni 1994
70.000,-

Mitsubishi Lancer
5h
km. 118.000, árg. juni 1992
sýnaður 12'01 50.000,-

Fiat Tipo
5h
km. 109.000, árg. mai 1989
sýnaður 11'01 26.000,-

Mazda E2200
Vøruvognur
km. 91.500, árg. mars 1997
sýnaður 06'01 90.000,-

Seat Cordoba 1,9SDi
STC. 5h
km. 35.500, árg. aug. 1999
115.000,-

Toyota Camry 2,2 GL
km. 143.000, árg. jan. 1993
80.000,-

Ford Escort
STC. Van
km. 95.500, árg. mars 1997
53.000,-

VW Polo
1,9TD
km. 120.000, árg. mai 1996
75.000,-

Ford Courier
Vøruvognur
km. 78.000, 1996
47.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820

# GSM kastar nógv av sær

**Føroya Tele kann vísa á eitt yvirskot áljóðandi 53 mió kr. Hetta er besta úrsltið nakrantíð hjá Føroya Tele. Stjórin, Andras Róin, fegnast um góða úrslitið, sum hann væntar verður í mesta lagi eins gott næsta ár. GSM-økið er fremsta orsøkið til góða úrslitið. 7.500 kundar komu afturat seinasta árið**

ÁRSROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*



*Andras Róin er serliga fegin um góða úrslitið, nú kapping er á flestu økjum*

Tað gongur gott hjá Føroya Tele. Árið 2001 gav felagnum 53 mió. kr í yvirskoti. Hetta er reint yvirskot, eftir at tað er sett av til skatt og 1,8 mió kr. eru goldnar til landskassan fyri konsessión og rakstur av fjarskiftiseftirlitinum.

Hesar 53 mió geva Føroya Tele sítt besta úrslit í 96 ára søguni hjá fyritøkuni. Árið 2000 gav Føroya Tele góðar 30 mió. at leggja afturat egingpeninginum.

Í tíðindaskrivi sigur Føroya Tele, at felagið hevur fingið so gott ovurstórt yvirskot, hóast lækkingar hava verið á prísunum.

Andras Róin, stjóri í Føroya Tele, fegnast sjálvsagt um góða úrslitið. Hann sigur seg vera serliga fegnan um, at teir høvdu eitt so gott úrslit, tá nú kapping eisini er á fjarskiftismarknaðinum.

Andras Róin sigur seg serliga fegnast um, at fyritøkuna er vorðin so væl konsoliderað.

– Fyritøkan hevur havt eina skuld omanfyri 300 mió, og nú nærkast henda skuldin hundrað milliónum, og vit hava sera góð lyklatøk at vísa til, sigur Andras Róin.

Hann roknar ikki við størri yvirskotið fyri 2002. Hann heldur, at tað í mesta lagi verður eins gott fyri 2002. Millum orsøkirnar til hetta er, at Føroya Tele stendur frammanfyri íløgum hetta árið, sum fara at táttað í tær 100 mió.

– Tað góða úrslitið hevur styrkt felagið munandi, og eru umstøðurnar samsvarandi betri at fremja størru íløgurnar, sum standa fyri framman. Nevnast kunnu íløgur í fastnetið og fartelefoni innanlands, í IP tøknifrøði í fjarskiftissambandið við útheimin, í nýggjar tænastur og nýggj virkisøki, í nýtt høvuðssæti og í framkomnar KT- og EDV loysnir, sigur Føroya Tele í tíðindaskrivi.

Nettosølan hjá Føroya Tele hækkaði við 14% úr 242,1 mió. til 276, 0 mió. í 2001.

Stóra yvirskotið hjá Føroya Tele sæst serliga á GSM-økinum. 57,5% av føroyingum nýta fartelefon dag. Við árslok var hetta talið 52%. Kundatalið hjá Føroya Tele er voksið munandi; 9.000 kundar eru lagdar afturat seinasta árið; 7.500 í í 2001 og einir trýtusund higartil í ár.

Á GSM-økinum hevur Føroya Tele sum er ongan at kappast við. Kall hevur boðað frá, at teir ætlað at koma við einum alternativi til Føroya Tele á GSM-økinum í ár. Og tað má sigast, at Føroya Tele ger sær dælt av støðuni. Inntøkurnar táttað í 70 mió fyri 2001, harafturímóti vóru inntøkurnar 50 milliónir í 2000, og hetta er ein vøkstur uppá 40%. Tørvurin hjá føroyingum at tosa í fartelefon er sostatt veksandi. Spurningurin er bara, nær marknaðurin verður mettaður.

Taksturin á GSM-haldum er eisini farin niður seinasta árið, soleiðis at vanligi prísurin nú er 1,90 kr. um minuttin um dagin, men hetta hevur ikki nervað ársúrslitið hjá Føroya Tele, sum nú altso hevði sítt besta ár nakrantíð í fjør.

### Vinningsbýti

Tað er landsstýrið/landið, sum eigur gamla Telefonverk Føroya Løgtings, nú Føroya Tele. Hesin partaeigarin fær 3 mió í vinningsbýtið fyri árið 2001. Restin verður lagt afturat partapeninginum, sum nú verður 207,7 mió.

Andras Róin heldur ikki, at hetta er ov lítið at lata í vinningsbýtið. Hann vísir á, at teir eisini gjalda konsessión og Fjarskiftiseftirlitið.

Teir hava harumframt sett 12,4 mió av til skatt. Endalig avgerð verður tikin á aðalfundinum hjá Føroya Tele, sum verður hildin 18. apríl, men tað skal vera ógvuliga løgið, um ætlanin hjá nevndini ikki verður samtykt.

### Í betra endanum

Føroya Tele er tann seinasta í einari røð av fyritøkum ella stovni, sum hevur víst á metúrslit fyri 2001. Føroya Banki hevði eitt yvirskot, áðrenn skatt, áljóðandi 210 mió. kr. Eftir skatt varð hetta talið til 168 mió. kr. Føroya Tele og Føroya Banki plaga liggja á ovastu rókunum yvir føroyskar fyritøkur, og tað sær eisini soleiðis út fyri árið 2001. Føroya Sparikassi, ið nú verður partafelag, kundi fyri 2001vísa á 73 mió fyri skatt og 58 mió. eftir skatt.

Hetta gevur alt eina greiða ábending um støðuna í samfelagnum. Tað er bert Føroya Sparikassi av hesum trimum fyritøkum, sum roknar við enn størri avlopið í 2001.

Bæði Føroya Banki og Føroya Tele hava eisini verið inni í myndini, tá tosað hevur verið um privatisering.

Andras Róin tilskilar, at hetta fult og heilt er ein politisk avgerð, men teir hava áður givið til kennar, at leiðslan ikki hevur so nógv ímóti, at Føroya Tele fer partvíst ella heilt á privatar hendur.

Andras sigur seg hava merkt, at tað er áhugi fyri at keypa í øllum førum part av Føroya Tele. Hann sigur, at tað er ein eitt ávíst fyrireikingararbeiði gjørt, men arbeiðið við at gera eitt endaligt prospekt er ikki gjørt enn. Hetta skyldast, at landsins myndugleikar ikki hava gjørt greitt, hvussu eitt tílíkt skal gerast.

Andras Róin sigur seg roknað við, at Føroya Tele kundi verið klárt til privatisering eftir hálvum árið, um tað skuldi verið. Varð avgerðin tikin nú, so hevði verið klárt at privatisera í endanum av árinum, sigur Andras Róin at enda.



*Tað er GSM-telefonir og hugurin hjá føroyingum at tosa í hesum, sum hevur givið Føroya Tele teirra besta úrsltit nakrantíð*

# Rás Tórshavn nærkast endaligari loysn

**Tað er líkt, at framtíðin hjá Rás Tórshavn verður loyst í endanum av mánaðinum. Samráðingarnar ganga væl, og ein endalig loysn er við at koma undir land**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*

Tað hevur verið tosað og skriva um Rás Tórshavn, nú kollveltandi broytingar eftir øllum at døma eru á veg. Føroya Tele hevur nú í nakrar mánaðir samráðst við útlendskar veitarar um at bjóða føroyingum eitt nýtt tilboð við fylgissveinarásum. Talan verður eftir øllum at døma um annað enn bert høvuðsstaðin, soleiðis at núverandi Rás Tórshavn fer at røkka longur.

Tórshavnar Býráð hevur sagt, at teir ikki eru sinnaðir at gjalda tær góðar 800.000 krónurnar, ið tað kostar at varðveita TV3 á skíggjanum hjá havnaborgarum. Býráðið hevur samstundis ásannað hvøja leið tað ber við Rás Tórshavn, og ætlanin er at Føroya Tele tekur yvir.

Føroya Tele hevur eisini samráðst í nakrir mánaðir. Tað hevur gingið eitt sindur striltið við hesum, men nú tykist ganga betur.

Andras Róin sigur við Sosialin, at teir væntandi hava eina loysn í endanum av mánaðinum, tá Føroya Tele hevur havt aðalfund. Tað verður enn samráðst við Viasat, men avtalur við aðrar veitarar eru komnar undir land.

Eftir hvat skilst verður talan um eina skipan, har fólk skulu keypa ein móttakara at seta til sjónvarpstólið eins og við parabolunum í dag, men neyðugt verður ikki við skálini uttanfyri.



# Somu skattafyrimunir til øll

**Allir løntakarar eiga at fáa sama rætt til skattafrádrátt, sum sjómenninir hava í dag, sigur valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum í Eysturoy**

LØGTINGSVAL
*Edvard Joensen*



*Allir arbeiðstakarar eiga at fáa sama skattafyrimun, sum fiskimenn fáa í dag, sigur Kenneth Rasmussen, valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum í Eysturoy*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Saltangará:** Tað eigur at vera soleiðis, at allir løntakarar í samfelagnum eiga a fáa sama rætt til skattafrádrátt, sigur Kenneth Rasmussen í Saltangará, sum stillar upp til løgtingsvalið fyri Sjálvstýrisflokkin.

Hann vísir á, at í dag fáa fiskimenn ein skattafrádrátt upp á 15%, sum aðrir samfelagsbólkar ikki fáa. Tann munurin eigur at verða javnaður, so eisini onnur hava rætt til hendan frádrátt.

Vit sita í køkinum heima hjá Kennethi á Heiðavegi. Hann er heima í dag, tí knapt tvey ára gamli sonurin, Beinir, er sjúkur, og konan er til arbeiðis.

Júst eitt av stevnumiðum Kenneths er í hansara føri vorðið veruleiki, hóast hann kundi hugsað sær tað undir øðrvísi umstøðum.

Hann heldur, at møguleiki skal gevast foreldrum at vera heima hjá børnunum ein part av degnum fyri samsýning. Á tann hátt høvdu verðið fleiri ansingarpláss til teirra, sum av einihvørji orsøk velja ella noyðast at lata børnini á ansingarstovn.

Eisini hevði tørvurin á at byggja nýggjar stovnar minkað munandi, samstundis sum tann av foreldrunum, sum var heima, heldur ikki hevði mist sambandið við arbeiðsmarknaðin.

### Strategiskur flokkur

– Eg velji Sjálvstýrisflokkin, tí hann liggur á eini strategiskari positión. Nær við alt og kann arbeiða saman við øllum, av tí at hann liggur á miðuni, sigur Kenneth Rasmussen.

Tað minnir ikki heilt einki um staðið, har Kenneth sjálvur býr her beint við høvuðsferðsluæðrina við Skálafjørðin. Bilarnir strúka framvið uttanfyri, og beint niðan fyri vegin er oljuhavnin. Eitt sindur longri úti liggja fleiri trolarar, bæði føroyskir, og eisini onkur útlendingur, og landa.

Á gólvinum hevur lítli Beinir funnið sær ein lítlan guitara og roynir at syngja kenda sunnudagsskúlasangin »Djúp og breið«, meðan hann av øllum alvi slær streingirnar.

– Sjálvstýrisflokkurin hevur í mun til støddina havt stóra ávirkan, ásannar Kenneth Rasmussen. Men tað kemur av, at hann kann arbeiða til báðar síður. Flokkurin er ikki læstur fastur á nøkrum veingi, vísir hann á.

Kenneth er sannførdur sjálvsstýrismaður av gamla stig fyri stig slagnum,

– Vit eiga at arbeiða fram móti búskaparligum sjálvbjargni, Ikki ov skjótt. Tí fer Sjálvstýrisflokkurin at forða fyri. Men heldur ikki ov seint. Tá fara vit at skumpa undir.

– Men vit eiga at náa fullum fíggjarligum sjálvbjargni, áðrenn vit fara at taka støðu til fullveldið. Tí ikki fyrr enn fólk hava upplivað, at búskapurin veruliga er sjálvberandi, hava tey førleika til at velja skilagott, vísir hann á.

### Unga fólkið

Unga fólkið skal bera samfelagið víðari, og teimum vil Kenneth Rasmussen serliga veita góðar sømdir.

Hann vísir á, at skal fólk støðast úti um landið, er týdningarmikið at trivnaðurin er til staðar.

Tosað verður ofta um íbúðartrupulleikar í Havn, og at har má nakað gerast.

Kenneth Rasmussen er sannførdur um, at íbúðartrupulleikum í Havn sleppa vit undan við at byggja út aðrastaðni.

Eru kommunurnar kring landið til reiðar at taka í móti fólki við ansingarplássum, bústaðarmøguleikum innan fyri rímiligt mørk og ymsum frítíðarmøguleikum, er einki til hindurs fyri, at fólk kunnu búgva ein til tveir tímar frá arbeiðsplássinum, sum ofta er í Havn ella har á leið.

Nógv ung fólk búgva uttanlands eitt ávíst áramál, og hjá mongum av teimum týðir tað einki at ferðast ein tíma ella tveir. Tey skulu bara hava nakað at koma aftur til, um tey yvirhøvur skulu fáast heimaftur.

Eisini má gerast nakað við inntøkuviðurskiftini hjá hesum ungu fólkunum. Tí tað er ein sannroynd, at rættiliga nógv av hesum ungu, sum seta búgv, hava væl minni eftir av lønini, enn eitt nú pensionistarnir hava. Hóast tað, at tað eru tey ungu, sum taka tey tungu tøkini.

– Ein møguleiki at minka um bústaðartrupulleikarnar kundi verið, sigur Kenneth Rasmussen, at latið fólk, sum hava bygt, sleppa at leiga út skattafrítt, um tað útleigaða økið er minni enn helvtin av sethúsunum.

Eisini sjálvur skattastigin skal broytast, sigur hann. Hann er ikki dagførdur í áravís og skal lagast eftir inntøkugrundarlagnum, sum tað er í dag.

Eitt nú skulu inntøkur upp á tveyhundrað- til hálvttriðjahundraðtúsund krónur skattast sum meðalinntøkur og ikki sum háinntøkur, sum gjørt verður í dag, sigur unga sjálvstýrisvalevnið í Eysturoy.

### Arbeiði uttanlands

Frádrátturin til handverkarar, sum arbeiða uttanlands, eigur at umskipast, sigur Kenneth Rasmussen.

Hann vísir á, at landstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur handfarið tað málið heldur jánkasliga.

Fyrst varð frádrátturin lækkaður frá 600,- til 300,- krónur um dagin. Og ætlanin var at fara niður á 100,- krónur. Men tað varð slept, tí her nærkaðist ov nógv vali til, at tað varð hildið ráðiligt, sigur Kenneth Rasmusssen.

Lækkingin niður í helvt hevur havt við sær, at handverkarar, sum arbeiða uttanlands eru farnir at nýta eina aðra reglu, sum ætlað var embætisfólki ella øðrum, sum vóru burtur í styttri tíðarskeið enn tær átta vikurnar, sum handverkarin skuldi vera burtur fyri at fáa frádrátt.

– Talan er í grundini um eitt slag av misnýtslu, tí reglan varð ikki ætlað til tað, hon verður brúkt til í dag, sigur Kenneth Rasmussen.

Hann vísir á, at tað eigur at verða gjørt soleiðis, at handverkarar, sum fara uttanlands at arbeiða, skulu fáa fulla frádráttin aftur, treytað av, at teir arbeiða fyri eitt føroyskt felag, og ikki bara fara sum einstaklingar. Á tann hátt leggja teir vitan eftir seg í Føroyum og styrkja tær fyritøkurnar, sum eru her, og tað eiga teir at fáa samsýning fyri.



*Kenneth Rasmussen heldur, at fólk eiga at sleppa at velja, um tey vilja vera heima hjá børnunum partar av degnum. Á tann hátt kunnu fleiri ansingarpláss verða leysgivin*

*Mynd Edvard Joensen*